# Førleikastovan

Úrslit av spurnarbløðum til leiðslur, serlærarar, lesivegleiðarar og AKT-lærarar

# Spurningar

1. Hvussu nógvir næmingar eru knýttir at tínum skúla?
2. Hava tit førleikastovu?
3. Hvør er knýttur at førleikastovuni?
4. Hvussu er førleikastovan skipað?
5. Hvussu hevur førleikastovan eydnast higartil?
6. Hvussu hevur førleikastovan ávirkað í mun til Sernám/NSR?
7. Hvussu heldur tú, at førleikastovan kann skipast á besta hátt komandi skúlaár?
8. Annað

# Spurd eru:

Hesi hava atgongd til stevnurnar:

- 69 leiðslur
- 39 serlærarar
- 30 lesivegleiðarar
- 25 AKT-lærarar

# Svarað hava:

- Leiðslur: 10
- Serlærarar: 14
- Lesivegleiðarar: 14
- AKT-lærarar: 8
- 22 skúlar, ið hava førleikastovu
  og 4 skúlar, ið ikki hava førleikastovu

# Hesar 22 førleikastovur umboða:

- 22 umboð fyri leiðslur
- 20 serlærarar
- 18 lesivegleiðarar
- 14 AKT-lærarar
- 3 SSP lærarar
- 2 SI-lærarar
- 2 skúlabókavørðir
- 2 skúlavegleiðarar
- 2 orðblindalærarar
- 2 lærarar í støddfrøði
- 1 lærari í serundirvísing
- 1 umboð fyri lágdeildina
- 1 umboð fyri miðdeildina
- 1umboð fyri hádeildina

# Manning og skipan

"Mær hevði dámað at kunna sett tann, ið eg haldi vera best egnaðan at manna førleikastovuna. Tað er ikki altíð, at tann ið hevur útbúgvingina, er tann rætti. Á tann hátt kundi eg fingið eina nógv betur virkandi førleikastovu."(leiðsla)

"Uppgávan hjá førleikastovuni má lýsast munandi betur. Her er neyðugt, at fólk við neyðugum og praktiskum innliti í skúlaverðina er við." (leiðsla)

"...fyri at fáa førleikastovuna at virka optimalt, ... mugu tey, sum eru tilknýtt førleikastovuna, fáa somu tímajáttan sum í ár." Hava skipað førleikastovuna eftir viðmælta leistinum. Umframt umsitur førleikastovan miðfirraðu tímarnar" (leiðsla)

# … framhald

”Førleikastovan umsitur tímarnar vegna serligan tørv og eisini teir miðfirraðu tímarnar. Førleikastovan er mannað eftir leistinum, men vit hava eisini eitt umboð úr øllum deildum skúlans.”

# Manning og skipan – niðurstøða:

**Størri skúlar:**
Fylgja viðmælta leistinum við góðum úrslitum.

**Smærri skúlar:**
Hava ikki førleikan á staðnum. Halda tað er trupult, at fólk koma uttanífrá.

# Tá førleikastovan eydnast

“Til dagliga arbeiði í skúlanum er førleikastovan gull verd, og er hon nógv brúkt í okkara skúla”

“ Førleikastovan hevur eydnast væl. Vit hava í fleiri ár havt eitt vælvirkandi sertoymi,... men við Førleikastovuni hava vit fingið eitt forum, har vit samansjóða arbeiðið betri”

“ “ ...nú er alt virksemið meira skipað”

“ ..alt er meira skipað og vit leggja okkum eftir at fáa til vega námsfrøðilig amboð og vitan, sum hevur til endamáls at hjálpa næmingum og lærarum í dagliga arbeiðnum.”

# Tá førleikastovan eydnast – niðurstøða:

- Skjótari hjálp
- Arbeiðið er betur skipað
- Nærri brúkarunum
- Leiklutirnir hjá serkunnleikanum eru útgreinaðir
- Førleikastovan hjálpir til, tá ið trupulleikar eru
- Veitir ráðgeving at skipa næmingalagaða undirvísing
- Veitir beinleiðis hjálp inni í flokkunum
- Hjálpir til í samskiftinum við m.a. foreldur og stovnar
- Ein sparringsfelagi hjá leiðslum

# Førleikastovan í mun til NSR/Sernám:

” Í mun til Sernám hevur Førleikastovan verið ein lætti fyri meg.” (leiðsla)

” lættari samskifti. Nú hava vit fingið stundir til at taka okkum av málum, sum stinga seg upp, og tað hevur verið sera gott. Gott hevur eisini verið at fingið skipað samstarv millum aktørarnar.”

” Við tað at man hevur fingð en samskipara á førleikastovuna koma lærarar til formannin vð trupulleikum, sum so samskftir við Sernám. Skipanin er einføld. Tað er ein hurð at venda sær til.”

” Skúlarnir hava kanska ilt við at taka broyttu mannagongdirnar til sín, men fara benleiðis tl Sernám/NSR at leita sær ráðgeving eins og teir eru vanir.”

” Eg havi ikki verið á nøkrum fundi ella samskift við Sernám ella NSR.”

# Førleikastovan í mun til NSR/Sernám – niðurstøða:

- Tættari og skjótari samskifti
- Bert ein 'instansur'
- Viðger mál, ið annars vóru farin beinleiðis til Sernám
- Bert tung mál fara víðari
- Førleikastovan arbeiðir við øllum málum, eisini teimum, sum eru tlmeldað Sernám, tí er vitanin stór, tá Sernám kemur inn í myndina
- Hjálpir lærarum at greina trupulleikar hjá næmingum
- Hjálpir lærarum at gera eina lærivætlan fyri næmingar

# Trupulleikar við Førleikastovuni:

- Førleikstovan hevur higartil verið alt ov lítið sjónlig millum lærarar úti á ymisku skúlunum
- Fleiri tímar mugu setast av til Førleikastovuna fyri at fáa alla servitanina inn
- Ov fáir tímar
- Trupult at samstarva við fleiri skúlar um Førleikastovuna
- Trupult, tá serkunnleikin ikki er á staðnum
- Vit hava havt byrjanartrupulleikar við, hvussu vit skulu arbeiða

# … framhald:

- Ov fáir tímar til serlærarar, lesivegleiðarar og AKT-lærarar
- Tímar til SSP og aðrar vanta
- Fáir serlærarar við eldru útbúgvingunum eru við
- Førleikastovan er ov illa lýst
- Leiðslur eru ov illa kunnaðar
- Ov lítið sjónlig
- Leiklutirnir ov illa greinaðir
- At røkka út á smærru skúlarnar
- Leiðslur hava ikki dugað at ment sertoymið til Førleikastovu (vegna sparing?)
- Serkunnleikin fær ov lítla tíð fyri at røkja smærru skúlarnar

# Misskiljingar?

- Áðrenn førleikastovuna høvdu vit sertoymi, sum eisini riggaði væl. Lærarar í sertoyminum vóru somu lærarar, sum høvdu miðfirraðar tímar. Nú eu hesir lærarar ikki við, tey  fáa ongar tímar

NIÐURSTØÐA: Tað er ein misskiljing, um lærarar kenna, at teir ikki fáa røkt teirra uppgávu í Førleikastovuni, tí tímar ikki fylgja við, og hetta er ikki í tráð við Álitið um Førleikastovur

# Uppskot um ábøtur

- at taka atlit til næmingar og lærarar, tá fundast skal
- at manningin hevur fakligan førleika
- at allýsa leiklutirnar
- at allýsa uppgávurnar í Førleikastovuni
- at Førleikastovan umsitur miðfirraðu tímarnar og tímarnar vegna serligan tørv
- at nøktandi tíð verður sett av til øll, sum manna Førleikastovuna
- at fáa eina FirstClass stevnu til vitanardeiling um Førleikastovuna

# Ítøkiligar ábøtur

- at fáa fleiri tímar til manningina á førleikastovuni
- at fáa serlærararnar við eldru útbúgvingunum við
- at AKT-lærararnir fáa eina útbúgving
- at fáa støddfrøðisvegleiðarar
- at fáa eitt skipað fyribyrgingararbeiði
- at fáa lesi og rokniskeið
- at fáa eftirmetngarskjal, ið fylgir næminginum, tá hesin fer í annan skúla/deild
- at hava næmingasamrøðublað
- at hava greiðar mannagongdir viðvíkjandi tagnarskyldu
- ikki bert at ráðgeva, men at fara inn í stovurnar við ítøkiligum átøkum!
- Hugskot úr Tofta skúla

# Bólkaarbeiði

- 13.00- 13.45 Ítøkilig uppskot til ábøtur

  *skal sendast til: [marjun@nam.fo](mailto:marjun@nam.fo)*

- 13.45- 14.45 Framløgur og kjak

Bólkur 1: leiðslur við skúlar 1-80 næmingar - Vaglið
Bólkur 2: leiðslur við skúlar við fleiri enn 81 næmingum - Vaglið
Bólkur 3: Serlærarar við minni skúlar - Flatnastova
Bólkur 4: Serlærarar við størri skúlar - Flatnastova
Bólkur 5: Lesivegleiðarar - Gestastova
Bólkur 6: AKT-lærarar - Gestastova
Bólkur 7: Orðblindalærarar - Húsastova
Bólkur 8: Sernám og onnur – Húsastova

Atgongd til teldu: dieks